gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Bláur málari sýnir fram á Tvøroyri



*Hanne Haarding fer hesar næstu tríggjar vikurnar at vísa list sína fram í listaskálanum Oynni á Tvøroyri. her er hon avmyndað frammanfyri verkið, sum hon nevnir "Hvør"*

**Týsdagin læt upp listaframsýning í listaskalanum Oynni á Tvøroyri. Samstundis ber til at fáa eina lítla máltíð og eitt glas afturvið í nýggju matstovuni, sum eisini er latin upp í Oynni**

LISTAFRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*

Seinnapartin hósdagin læt ein forvitnislig listaframsýning upp í Listaskálanum Oynni á Tvøroyri.

Tað er danska listakonan, Hanne Haarding, sum hesar næstu tríggjar vikurnar fer at vísa verk fram í Suðuroyni fyri listaáhugaðum.

Hon er úytbúgving bláur málari á kongligu postalínvirkinum, har hon eisini arbeiddi í nøkur ár. Annars hevur hon lært hjá listafólkunum, Grethe Bagge og Kaj Lange, umframt at hon hevur búð seg út á Blågaards seminarium, og lærarahaskúlanum.

Hon sigur, at hon heldur seg nógv til grundlitirnar, men hon roynir seg eisini fram við tilfarið og litum.

Seinastu árini hevur hon havt nógvar framsýnmingar ymsastaðni í Danmark, men hetta er fyrstu ferð, at hon er í Føroyum.

Á framsýningini eru útvið 30 fjølbroytt verk.

Tey, sum vilja vita meiri um listina hjá Hannu Haarding, kunnu hyggja at heimasíðuni hjá henni á alnetinum á www.gallery-hanne.dk

## Nýggj Kafé

Palle Juslgart, sum eigur listaskálan Oynna, sigur, at hann heldur at tað hevur týdning at fáa list út um landið so at tað ikki bara eru havnarfólk, sum hava møguleikan at síggja hendan partin av mentanini.

Tí hevur hann gjørt listaskálan og hann er eisini við at fáa eitt samstarv við Norðurlandahúsið á føtur.

Fyri at gera listaskálan hugnaligari hevur hann eisini gjørt eina lítla kafé í Oynni, har fólk kunnu fáa eitt lítið máltíð og eittt glas av øli ella víni afturvið, ella tey kunnu fáa kakur og kaffi, ella te.

Oyggin er opin hvønn dag frá kl. 15-20, uttan mánadag, tá ið tað er stongt.

# Lønarhækkingin fer at trýsta fiskaprísin niður

**– At lønirnar á landi eru hækkaðar, fer at vísa seg aftur ígjøgnum alla skipanina og tað er onki at ivast í, at tað fer at síggjast aftur í lækkandi fiskaprísum**

FISKAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*



*– Tað at lønirnar fara upp, fer at leggja fiskavirkini undir trýst og vandi er tí fyri, at avreiðingarprísirnir fara ikki at vera so høgir, sum teir annars høvdu verið. Samstundis hevur hetta styrkt um støðuna hjá útlendskum keyparum*

Tað, at arbeiðsfólkið á landi nú fer at fáa meiri í løn, fer uttan iva at føra við sær, at avreiðingarprísurin á fiski, verður trýstur niðureftir.

Tað halda bæði teir, sum selja fisk og teir, sum keypa fisk.

Teir siga, at hækka lønirnar á landi, kann rokningin bara fara tveir vegir. Antin má prísurin á marknaðinum upp, ella má prísurin á ráfiski niður.

– Prísin á marknaðinum hava vit lítla og onga ávirkan á, sigur Abraham Løkin, formaður í ráfiskaseljarafelagnum.

– So har fáa vit onki gjørt, leggur hann afturat.

Hann sigur, so er ongastaðni at fara við rokninini fyri lønarhækkingina enn í hin endan á skipanini, tvs, til teir, sum fiska.

– Tað er onki at ivast í, at rokningin fyri lønarhækkingina fer at planta seg ígjøgnum alla skipanina og at enda hjá okkum, sum selja fiskin.

Hann sigur, at virkini verða rikin so væl sum yvirhøvur gjørligt. Tað hevur tann harða kappingin um rávøruna tvingað virkisleiðslurnar til, so tað ber neyvan til at vinna pengingin innaftur við effektiviseringin.

Tí ivast hann ikki í, at lønarhækkingin fer at trýsta avreiðingarprísin niður.

Hann sigur, at hann hevur longu fingið at vita frá ráfiskakeyparum, at skulu virkini á landi betala meiri í løn, má avreiðingarprísurin niður.

– Tað var fyrsta reaktiónin frá ráfiskakeyparunum til okkum, sum selja.

Hann sigur, at lønarhækkingin fer eisini at føra við sær, at tað verður dýrari at virka fisk í Føroyum og tískil fer kappingarførið hjá føroyskum virkjum at bjóða uppá fiskin, at versna.

– Hetta fer so aftur at føra við sær, at føra við sær, at útlendskir keypari fara at standa sterkari í kappingini um føroyska fiskin og hava størri møguleika at bjóða hægri prís, enn føroyskir keyparar fáa bjóða.

Hann sigur, at eins og tað er marknaðurin sum avgerð útflutningsvirðið, er tað tíbetur eisini marknaðurin, sum avgerð avreiðingarvirði og fæst ikki tann rætti prísurin í Føroyum, ber til at fara uttanlands.

Í løtuni eru reglarnar, at minst ein triðingur av fiskinum, sum eitt skip avreiðir, skal seljast um góðkenda uppboðssølu í Føroyum.

Allur fiskur, sum skal sendast av landinum, skal eisini seljast á uppboðssølu.

Men tað er ikki ókent, at teir, sum senda fisk av landinum, bjóða hann út á uppboðssølu, men keypa hann sjálvur.

Og tað hevur fingið summar at kalla uppboðssøluna fyri.

## Leggur allar undir trýst

Formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum, Páll Gregersen er ikki heilt so avgjørdur.

Hann sigur, at tað er eitt satt undur, so nógv, sum føroysk fiskavirki hava ment seg seinastu sjey, átta árini.

– Nú eru vit komin hartil, at, hvat effektiviteti viðvíkur, eru føroysk virki á sera høgum støði og vit standa okkum sera væl í kappingini um ráfiskin. Fiskaprísirnir í Føroyum er teir hægstu í heiminum.

– Nú lønin fær upp, verður neyðugt at vit spíla okkum enn meiri út á øllum økjum.

Páll Gregersen sigur, at lønarhækkingin fer at leggja alla skipanina undir trýst. Allir teir, sum vit samskifta við, koma undir trýst. Og har er ráfiskaprísurin ein partur, tí nú fáa virkini ikki heilt so nógvan pening at keypa fisk fyri, sum tey hava havt. Tí er vandi fyri, at avreiðingarprísurin fer eitt sindur niður.

– Men virkini mugu eisini effektivisera meiri, umframt at vit mugu royna at vinda enn meiri burturúr marknaðinum og eitt nú eisini hugsa um prísin á pakkitilfari.

Hann sær tó ikki svart uppá tað.

Hann heldur, serliga, at hetta fer at merkjast týðiligast í teimum bíligari fiskasløgunum.

– Eg veit ikki, um hetta verður øðrvísi enn ein broyting í gjaldoyranum. Gjaldoyrað fer upp og niður og tað mugu vit arbeiða eftir. Tá ið tað gongur skeiva vegin, plantar tað seg ígjøgnum skipanina, men tá ið ein tíð er fráliðin, javnar alt seg út og so hugsar ongin meiri um tað, heldur Páll Gregersen.

Annars vísir hann á, at teir dagarnir, sum eru farnir higartil, hava ikki bent á, at prísirnir fara at lækka.

Hann sigur, at í verkfallinum varð toskur 3, avreiddur fyri 15-16 krónur fyri kilo. Men fyrra partin í hesi vikuni, reyk hann tríggjar krónur upp, upp, tí nú hevur hann kostað yvir 19 krónur kilo.

# Besta árið hjá higartil

**Lemmatrolarin, Føniks á Tvøroyri, hevur fiskað fyri næstan 10 milliónir higartil**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Hóast tølini, sum eru til taks, vísa, at virðið av tí, sum lemmatrolararnir hava fiskað, er væl minni fyrsta ársfjórðing í ár, enn tað var í fjør, hevur tað gingið rættiliga væl hjá fleiri av bátunum.

Eitt nú hevur árið í ár higartil verið tað besta nakrantíð hjá Føniks av Tvøroyri. Hetta er afturat tí, at hann ikki fór til fiskiskap fyrrenn 12. januar, tí motorurin skuldi umvælast, so at hann misti ein túr.

Higartil í ár hevur hann fiskað fyri 9,8 milliónir.

Tað er ikki minst hesar báðar seinastu mánaðirnar, at tað hevur gingið sera væl hjá Føniks, tí hesa tíðina hevur hann avreitt fyri gott og væl 6,5 milliónir.

Sostatt er eyðsæð, at hann hevur gjørt nakrar sera góðar túrar. Besta túrin avreiddi hann fyri 1,7 millión. Tað var ein túr, har hann avreiddi 140 tons av kongafiski og upsa í Cuxhaven. Hann hevði eisini ein annan góðan tú, tá ið hann avreiddi blálongu í Vági fyri 1,6 millión.

Tað eru tey trý fakfeløgini, Fiskepigernes Fagforening, Arbeiðsmannafelagið Fylking og Tvøroyrar Handverkarafelag, sum eiga Føniks.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Bilar

Nr. 102 • hósdagur • 31. mai 2001 • 75. árgangur

# Peugeot 307 – størstur í sínum klassa



*Nógv er gjørt burturúr trygdini á Peugeot 307. Hann hevur til dømis 4 airbag, og gardinairbag í síðunum til at verja høvdið við ein síðusamanstoyt*

*Myndir: Jens K. Vang*

**Ein av mest spennandi nýggjheitunum á bilaframsýningini í Geneve í vár, var Peugeot 307. Bilurin, sum avloysir Peugeot 306, setur heilt nýggjan standard fyri klassan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Peugeot 307 er ein bilur í sonevnda Golf klassanum. Bilurin er sera vælgjørdur, rúmligur og sigst at vera størstur í sínum klassa. Innan er eisini gjørt nógv burturúr, við góðum tilfari, stórum og góðum setrum, sum annars bert eru at finna í dýrari bilum. Sera gott pláss er innan, høgt til loftið, eins og í einum MPV. Koyrieginleikarnir eru á høgum støði. Undirvognurin er ein heilt nýggj konstruktión, har alt er tilpassað hvørt eftir øðrum. Hjólini eru 15", og bilurin er stúttur og liggur sera væl á vegnum.

## Trygdin í hásætið

Nógv er gjørt burturúr trygdini á Peugeot 307. Hann hevur til dømis 4 airbag, og gardinairbag í síðunum til at verja høvdið við ein síðusamanstoyt. Fýra skivubremsur við elektroniskum bremsudeilara og nýggju Emergency Brake Assistant skipanini, sum tryggjar at bilurin altíð bremsar skjótast møguligt. Eisini hevur hann aktivt førarasetur við aktivum nakkastúttum, sum minka um vandan fyri koyrilsbresti, »piskesmæld«. Karossarí konstruktiónin á 307 er styrkt á øllum útsettum støðum.

## Fýra útgávur

Fýra útgávur eru at velja ímillum, XR, XS, SE og HDI. XR útgávan hevur 1.6 litur motor við 110 hk. XS og SE hava 2.0 litur motor við 138 hk, har XS er tann sportliga útgávan, meðan SE er luksusbilurin sum fæst við leðursetrum og aðrari útgerð. Seinast er 2.0 HDI við 90 hk, sum er nýggjasti turbodiesel motorurin hjá Peugeot, ið kraftar væl og dálkar sera lítið.

## Opið hús leygardagin

Í sambandi við at Peugeot 307 er komin til landið, verður opið hús leygardagin 2. juni hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin, frá kl.10.00 til 14.00, har høvi verður at síggja og royna bilarnar, bæði við bensin- og dieselmotorum.

## Peugeot 307 HDi 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2.0 litur 90 hk turbodiesel v.common-rail |
| 0-100 km/t | 13.0 sek |
| Oljunýtsla | 19.2 km/l |
| Dekkstødd | 195/65 - 15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 420,2 cm |
| Breidd | 174,6 cm |
| Hædd | 151,0 cm |
| Eginvekt | 1250 kg |
| Totalvekt | 1750 kg |
| Viðførisrúm | 420 litrar |
| Prísur | kr. 189.000,- v/aircondition<br>XR 1.6 prísir frá kr.163.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v.Oggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 316161 |




